VIÐMERKINGAR

# Røtt rættleiðing

**Oddfríður Marni Rasmussen**
*Formaður í Listafólkasambandi Føroya*



Ein rættleiðing er at rætta uppá tað sum er sagt skeivt. Eftir teirri rættleiðing sum Óli Holm hevur í Sosialinum tann 12. oktober, eri eg í iva um, hvussu orðið skal skiljast. Hann rættleiðir ikki nakað sum helst, sum eg havi sagt, hann viðurkennur tað at játtanin er lækkað. Tann kontoin (sum í rættleiðingini onki navn hevur) sum er til »mentanarligar verkætlanir (ymiskir studningar) er lækkað úr 2 mió. kr. niður í 1,7 mió. kr«, veit eg onki um. Men fyri at ongin misskiljing skal koma í, vil eg hervið gera tað greitt fyri Óla Holm, um tað sum varð sagt við Edvard Joensen, blaðmann á Sosialinum, til blaðið mikudagin tann 10. oktober.

Tað, sum eg segði var, at Mentunnargrunnur Landsins hevur eina játtan uppá 3. mió. kr. Av teimum trimum milliónunum fara 1,5 mió. til starvslønir og hinar 1,5 mill. kr. eru til verkætlanir. Tað, sum er hent við listastarvslønunum er, at nú sita fleiri listafólk og hava tíð at arbeiða í longri tíð við síni list, sum rímiligt er, men tá ið tey eru liðug við arbeiðið, eru ongir pengar til verkætlanir, tí at tann parturin, er í prinsippinum hálveraður. Tað er ikki rætt at geva trý ára-, tvey ára-, eitt ára- og hálvt ára starvslønir til listafólk, og ikki kunna stuðla úrslitinum, tí at ikki nóg nógvir pengar eru. Hetta er við til at gera tað, at tey sum royna at presentera listafólkini fyri føroyingum, við at geva bøkur út, at halda konsertir, at sýna málningar fram osfr., ikki megna at sýna úrslitið fram av okkara mætastu listafólkum.

Óli Holm sigur, at játtanin til list og mentan er hækkað úr 46 mill. til 60 mill. kr. Eg veit eisini fullvæl, at játtanirnar til skapandi og útinnandi list eru hækkaðir nógv hetta valskeiðið, men um politikarar í Føroyum ætla at halda áfram við at menna føroyska mentan og harvið føroyskan samleika, so mugu teir lurta eftir tí tørvinum sum er, so at listafólk fáa so góðar umstøður sum gjørligt til at halda áfram, at menna føroyska mentan og harvið føroyskan samleika.

*Framhald av síðu 9*

kanskir. Tað var eitt, sum ilt var at koma uttan um. Tað var: Eingin kundi siga, at tað var satt, tað sum amerikanska stjórnini tvíhelt um, at fjøld av herfólki hjá Saddam Hussein var við greinsuna til Saudi-Arabiu. Ikki hevur Pentagon enn latið úr hondum almennar myndir, ið prógva teirra framførslu.

**Fjølmiðla siðvenja**
Nú er hetta í journalistiskum høpi rættiliga áhugavert, hvat leikar á, tá ið tíðindi um krígsførslu skulu alment fram. Hvør hevur rætt í hesum føri er eisini áhugavert, men at síggja hvussu ólíka krøvini eru til prófførsluna um irakiska herfólki, gevur einum ta fatan, at valdsharrarnir í mongum føri bera blak í eyguni á fólki. Jean Heller og amerikansku serfrøðingarnir gjørdu sum góður og dygdargóður fjølmiðlavani eigur at verða, er at fara til óheftar keldur, og vita um Pentagon talaði satt. Tá ið keldurnar ikki eru samsvarandi við almennu boðini, so átti eitt kjak spurt burtur úr hesari gongd. Allar tær stóru tíðindatænasturnar tagdu hetta burtur og litu á tað, sum Pentagon segði.

Søgan hjá St. Petersburg Times doyði, tí Pentagon tvíhelt um, at teirra frásagn var tann rætta.

**Fjølmiðlafólk**
Tá ið lond fara í kríggj, verður tað fata sum landasvik at seta nærgangandi spurningar til tað sum fyrifert. Tað eru jú ungfólk, sum nú skulu út at berjastseta livið í vága fyri fosturlandið, tess dygdum og rættindum. Tað mátti t. d. Harrisson Salisbury sanna frá Norður Vietnam, men mangan gongur henda hugsan sum á skeringi. Peter Arnett upplivdi tað sama, tá ið hann sat í Bagdad, meðan bumburnar regnaðu yvir Bagdad í krígnum, sum bar heitið Desert Storm. Undir slíkum korum er oftani brúk fyri óheftum fjøllmiðlum og tíðindafólki, sum bert hava tað fyri eygað, at bera sonn tíðindi. Her er tað at ryggsekkajournalistarnir koma inn í myndina, ið fara avstað bert við einum fjallarevi á bakinum - eygleiða, undirsøkja, granska og finna útav mongum sum fyrifert, ið tøknin ikki er før fyri at greina, og mong eru dømini um slík fjølmiðlafólk.

Jean Heller gjørdi ikki so stóran háva burtur úr sær, men hon gjørdi tað, sum eitt og hvørt tíðindafólk átti at gjørt, at granska og kanna um nú Pentagon talaði satt. Myndirnar, ið hon fekk, kostaðu snøggar 10.000 norskar krónur, sum flestu avísur høvdu ráð at keypa.

**Tíðindaflutningur**
Her er so nógv at tríva í eisini hjá føroyskum fjølmiðlafólki. Hvussu fer leikur nú fram í tíðindaflutninginum úr Afghanistan? Vit kenna tíðindaflutningin frá Falklandskrígnum, Eystur-Timor, Libanon krígnum og Balkan krígnum. Torført var tað hjá ærukærum tíðindatænastum, at flyta røtt tíðindi frá vígvøllinum. Í Falklandskrígnum fingu fjølmiðlarnir munnkurv. Á Eystur-Timor hava fleiri tíðindafólk mist lívið, bert tí tey vildu siga frá teimum ræðuleikum, sum har hava verið síðani sjeyti árini. Stórveldini lótu sum einki, tí størri áhugu var í tí stóru indonesisku fólkamongdini sum brúkari enn at seta fingur á Suharto og hansrar ágangi móti fólkinum á Eystur -Timor.

Í Libanon krígnum fingu vit misjøvn tíðindi. Um lurtað varð eftir tíðindunum frá Ísrael, so samsvaraði hetta ikki teimum, sum tú fekst frá palistinensum. Valdsharranir í Balkankrígnum gjørdu sum nasistarnir gjørdu undir Seinnaheimsbardaga, brúktu sjónvarpsupptøkur(filmsupptøkur) til at fremja sína "propagandu". Nasistarnir brúktu filmin , so lítil munur er millum hesi bølmenni frá Seinna heimsbardaga og teimum í dag.

Hvat fer at spyrjast burtur úr tíðindaflutninginum frá amerikanska álopinum á Afghanistan, er ilt at siga, men alt endyrtekur seg, og sannleikin fæst sjáldan í ljósmála fyrr enn fleiri ár eftir at vápnini hava talað.

Vit kenna ein ódám fara yvir heimin í løtuni. Ein ótryggleika. Kjøti krimpar seg. Menniskjað er ikki blivið klókari. Tað sást eisini væl á framsýningini á Arkini í Keypmannahavn síðsta heyst, hvussu menniskjakroppurin varð píndur og tíndur í hesum øra heimi í seinnu helvt av fyrru øld_. og einki íhald er í hesi framferð. Tað stendur bara við og versnar. Ja, tað nyttar lítið, hvat gjógvarámenn siga!

Δ

Í Býin

frìggjakvøldið 19/10 Band Discoteque
Konufólk ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00
leygarkvøldið 20/10 Band Discoteque
PLATFORM

AUTO
-Dag sum nátt- -skjótt og gott-
-ALT DØGNIÐ-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
Skal tú bil hýra -so er tað 311234
AUTO
311234

NÁTT-BUSSURIN

Hafnia Lounge



Í Býin

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 19. oktober
• "Fimmari"
• Opið er frá kl. 17.00
UNDIRHALD
Leygardagin 20. oktober
• Sjavskapping
• Opið frá kl. 19.00
• Dansur frá kl. 24.00 - 04.00
Jan skipar fyri

fk Matseðilin
Hósdagin 18. oktober: Veiðimannagrýta
Fríggjadagin 19. oktober: Nakkakotelettir
Leygardagin 20. oktober: Culottesteik
Mánadagin 22. oktober: Kjøtfrikadellir
Týsdagin 23. oktober: Fisk í fati
Mikudagin 24. oktober: Hakkibúffur
Kostnaður 35,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Kaggin
Í vikuskiftinum spæla
Fluffy Toys
Sosialurin - 311820
www.kaggin.fo

HESA VIKUNA
Hóskvøldið DJ Tummas Gudmundsen
Fríggjakvøldið ladies night DJ Martin Kjærbo
Leygarkvøldið DJ Magnus Zachariasen
Fótbóltur á stórskíggja
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM 69,–
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

Grill kvøld
Leygarkvøldið 20. oktober
2 rættir kr. 185,-
Borðbílegging á tlf. 31 75 00
Hotel Føroyar

Jólaborðhald
Nú jólini nærkast, skipa vit aftur í ár fyri okkara vælumtókta jólaborðhaldi
TAXI spælir til dans øll kvøldini og kabarettin "Krebinettin" verður aftur á pallinum
Ring og fá ein jólafaldara tilsendan tlf. 31 75 00
Hotel Føroyar

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Bergmenn
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Nú fleiri ódyrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

Í Býin - hvønn hósdag

Í Býin - hvønn hósdag

Á matarseðlinum
Suppa og breyð 35,-
Sandwich Baguette
kylling & bacon: karry dressing, salat og tomat 45,-
ost & skinka: miracel whip, tomat og bacon 45,-
ost & kalkun: miracle whip, tomat og bacon 45,-
Lasagna v/oksakjøt 49,-
Pitabreyð v/oksakjøt 49,-
v/tunsalat 49,-
livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25
Sosialurin 311820

BýIN - HVøNN HóSDAG